# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

**Hólmgonga:**

## Eidesgaard vs Hoydal

Fyri fyrstu ferð, síðani nýggja samgongan tók við, hava føroyingar í Keypmannahavnarleiðini møguleika at uppliva tveir teir fremstu føroysku politikararnar í politiskum kjaki.

Mikudagin fara Jóannes Eidesgaard, løgmaður og Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins, at dystast í eini sonevndari hólmgongu.

Evnini sum nomin verða við eru: útbúgvingarpolitikkur, úrvald innlendismál, uttanlandspolitikkur, yvirtøkulógin og framtíð Føroya sum heild.

Beinta Løwe Jacobsen, verður orðstýrari á kjakfundinum, sum MFS, Meginfelag Føroyska Studenta, skipar fyri.

Í steðginum verður tónleikur framførdur, eisini fáa áhoyrarirnir møguleika umvegis orðstýrarin at seta løgmanni og formanni Tjóðveldisfloksins spurningar.

Tiltakið verður 1. desember klokkan 19 í Føroyingahúsinum á Vesterbrogade 17 í Keypmannahavn - møtið fjølment.





## Takk fyri stuðulin



Eina hjartans tøkk til tykkum øll, sum valdu Javnaðarflokkin, og ein serlig tøkk til tykkum, ið valdu okkum persónliga

*Við javnaðarkvøðu*

**Katrin Dahl Jakobsen og Elin Lindenskov**

## Takk



Eg takki øllum tykkum, sum valdu meg persónliga til kommunuvalið.
Guð vælsigni tykkum øll

**Eyðfinn Mørk**
**Vági**

## Takk



Hjartaliga takki eg øllum, sum stuðlaðu mær so dyggiliga til býráðsvalið í Runavíkar kommunu

**Rodmundur Nielsen**

# Nanny og Kjartan Nielsen gullbrúdleyp



Sunnudagin, 28. november, eru 50 ár, síðan Nanny og Kjartan Nielsen í Saltangará gingu saman í hjúnalag. Tey vórðu vígd í Glyvra kirkju.

Tey eiga trý børn. Jón býr í Saltangará og eigur tvey børn, Edvard er giftur Onnu Mariu; tey búgva í Havn og eiga tveir synir, Nicolina er gift Jack; tey búgva í Fuglafirði og eiga trý børn.

Nanny er fødd 11. juni 1934 og er ættað úr Rytuvík. Foreldrini vóru Edvard og Dina Højgaard. Edvard var yngsti sonur fyrstu niðursetufólkini í Rytuvík. Dina var ættað av Regni á Toftum. Dina og Edvard fingu sjey børn, harav tvey eru deyð.

Kjartan er føddur 4. juli 1927. Hann er yngsti sonur Justines og Nicolinu Nielsen. Tey vóru bæði ættað úr Heiðunum. Tey fingu átta børn, harav trý eru eftir á lívi.

Nanny fór, sum vanligt var tá í tíðini, út at tæna. Hon var í fleiri húsum, og hon var eisini í Havn. Áðrenn hon giftist, arbeiddi hon eisini í fiski á Høgabóli. Meðan børnini vóru smá, var hon heimaarbeiðandi. Við hús hevði hon nokk at gera, tí Kjartan var sjómaður og burtur stóran part av árinum. Hon hevði kúgv, og seyður var eisini, sum hon passaði, tá ið Kjartan var burtur.

Tá ið hon aftur fór út at arbeiða, fór hon fyrst at vaska skúla í nøkur ár. Síðan fór hon at arbeiða á Lynfrost, og har arbeiddi hon, til hon fylti 70 ár – burtursæð frá, at hon í sjey ár arbeiddi á Heiða Netavirki. Hon hevur eisini sitið sum nevndarlimur í Arbeiðarafelagnum Hæddini í fleiri ár.

Kjartan var ungur undir krígnum, og tá var ikki so nógv arbeiði at fáa. Men eitt sindur av fiskaarbeiði var, og so fiskaðu teir eisini sild.

Sum 17 ára gamal fór hann til skips, og fyrsti túrurin var við sluppini, Lissy. 20 ára gamal fór hann til Havnar á háskúla, og 22 ára gamal fór hann á skiparaskúla.

Kjartan hevur verið við fleiri skipum – líka frá sluppum til stórar trolarar. Størsta partin av tíðini hevur hann siglt við skipum hjá P/F Lógv í Saltangará, bæði við Oknini og Nýpuni. Við Oknini fiskaðu teir eitt nú rækjur í Grønlandi. Hann sigldi oftani sum bestimaður.

Í 1984 legðist Kjartan upp á land, tó at hann var onkran túrin eftir tað, eitt nú við Roc Amadour.

Uppilagstur fór Kjartan á Lynfrost at arbeiða. Har var hann, til hann fylti 67 ár. Eftir tað fór hann at arbeiða hjá Nevinum, og har var hann, til hann var 76 ára gamal og gavst at arbeiða.

Gullbrúðarparið hevur havt eitt langt og gott familju-og arbeiðslív. Nú njóta tey pensjónista-tilveruna og putlast við ymiskt heima. Heilsan er farin at bila hjá Kjartani, so hann fæst ikki við seyð longur, sum honum annars dámdi sera væl.

Nanny dámar ógvuliga væl at fáast við urtagarðsarbeiði, og um summarið er havin hjá teimum ein frægd fyri eyga.

Teimum dáma væl at fáa vitjan av ommu- og abbabørnunum, og børnunum dámar væl at vitja tey gomlu.

Stóri dagurin verður hildin í húsunum hjá Eldrafelagnum Nón í Runavík, har øll eru hjartaliga vælkomin millum klokkan 13 og 18.

# Nýggj skaldsøga

**Ein av fyrstu døgunum kemur út nýggj skaldsøga, ið Absalon Absalonsen hevur skriva og gevur út á forlagnum Løkur Lítli. Bókin er 228 blaðsíður við 10 myndum, sum rithøvundurin sjálvur hevur teknað, hon verður prentað á Einars Prent og fer at kosta 240 kr í bókabúðunum.**
**Trý av teimum, sum hava lisið søguna, geva henni fylgjandi ummælir**



*Absalon Absalonsen*

**»Hjálpt úr neyð«**
*eftir Absalon Absalonsen.*

Ein sera grípandi og væl samansett skaldsøga við støði í viðurskiftunum, sum valdaðu í Føroyum í 18. og 19. Øld. Við sínum kunnleika í søgu og viðurskiftum okkara bæði á sjógvi og landi, hevur tað eyðnast Absalon at flætta veruligar og tilhugsaðar hendingar inn í hugtakandi søgugongdina í bókini. Við ríku ímyndingarevnum sínum lýsir høvundurin umstøðurnar í oyggjum okkara hetta hendingaríka tíðarskeið í fátækdømi, armóð og hungursneyð eins og í gudsótta, næstrakærleika og gávumildi millum fólkið. Tú fært valla slept bókini, tá tú ert byrjaður at lesa, tí her møtir tú drama-tikki, spenningi, roman-tikki, øvund, góðsku og sonnum kristindómi í gerandislívinum, sum fær teg bæði at gráta og grína.

**Zakaris Zakariassen.**

Í søguligum høpi varpar skaldsøgan ljós inn yvir jarðarlívið. Hin kristna trúgvin er lýst á ærligan og sannan hátt. Náði Guðs í trúnni á Jesus elur fram góða hugsan til gott verk at inna. Ein fløvandi hiti vellir úr skaldsins huga og skapar eina perlu millum kristnar bókmentir. Bókin kemur ikki einans at standa á hillini, - hon er vorðin ein partur av mær sjálvum. Hon hitar mítt hjarta, styrkir mína trúgv og elur fram ta bøn, at eg mótvegis øðrum má vera eitt gott mennisja.

**Jógvan Fríðriksson.**

Absalon hevur lagt eitt framúrskarandi arbeiði úr hondum. Hetta er ein kærkomin søga. Hon sigur m.a. hvussu næstrakærleiki kann broyta tilveruna hjá fólki og vinna á tí ónda. Tann, sum fer í holt við hesa bókina, hevur ringt við at leggja hana frá sær, fyrr enn hon er liðug, so spennandi er hon. Ein frálík jólagáva.

**Hanna Lisberg**



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Robert James Brown:

# Professari í jarðalisfrøði á Náttúruvísindadeildini

**1. oktober tók Robert James Brown við sum professari í jarðalisfrøði á Náttúruvísindadeildini á Fróðskaparsetrinum. Í tí sambandi skipaði Fróðskaparsetrið fyri móttøku og fyrilestri í Nóatúni hósdagin 25. november**

### MÓTTØKA

Móttøkan byrjaði við at Malan Marnersdóttir, rektari á Fróðskaparsetri Føroya, beyð Robert James Brown, professara, vælkomnum. Síðan helt hann starvstøkufyrilesturin "Nakað um jarðalisfrøði og nakað um tøl".

Robert James Brown er 61 ára gamal. Hann hevur starvast innan jarðalisfrøði á universitetum í fleiri londum. Hann tók master prógv í jarðalisfrøði á Universitetinum í Manitoba í Kanada í 1968. Í 1973 tók hann Ph.D. prógv í seismikki við Universitetið í Uppsala í Svøríki.

Síðani 1980 hevur hann verið knýttur at Universitetinum í Calgary í Kanada, men hevur eisini í styttri og longri tíðarskeið verið knýttur at øðrum universitetum sum gestagranskari, td. í Sydney í Avstralia og Luleå í Svøríki.

Seinastu árini hevur Robert James Brown arbeitt sum serfrøðingur í jarðalisfrøði, serliga seismiskum datatænastum hjá norsku ráðgevingarfyritøkuni GeoGrids.

Á yrkisleið sínari hevur Robert James Brown skrivað hópin av greinum í viðurkendum tíðarritum.



*Malan Marnersdóttir, rektari á Fróðskaparsetri Føroya, beyð Robert James Brown, professara, vælkomnum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Vinnararnir funnir av Shell Helix Grand Prix 2004

**Eins og í fjør skipaði Shell fyri stóru Shell Helix Grand Prix kappingini, har ið allar bilasølurnar og verkstøðini í Føroyum kundu luttaka**

### TÍÐINDASKRIV

Høvuðsvinningarnir vórðu drignir 25. november av Magnus Gunnarsson frá Sosialinum á skrivstovuni hjá Føroya Shell á Viðarnesi.

Fyrsti vinningur, sum er ein ferð til Formel 1 til San Marino í Italia vann: Jan Niclasen, ið starvast hjá P/F D.B.Bilar.

Annar vinningur, sum er ein ferð til Sturup Raceway í Svøriki vann: Jona Jensen, ið starvast hjá P/F Meinhardt Arge.



*Magnus Gunnarsson frá Sosialinum (v.m.) við 1. virðisløn og Erling í Liða, sølu- og marknaðarleiðari hjá Shell við 2. virðisløn*




# Hátíðargudstænasta í Hvalvíkar kirkju

Í samband við, at tað í ár eru liðin 175 ár, síðani Hvalvíkar kirkja varð bygd, verður í morgin klokkan 11.00 hildin hátíðargudstænasta har.

Kingokórið í Tjørnuvík fer at luttaka við gomlum donskum uppruna kingosálmum, sum verða sungnir uttan tónleik.

Eisini fer Magni Christiansen at syngja og spæla.

Aftaná gudstænastuna verður døgurði fyri bygdarfólkunum, bispi, próvsti og fyrrverandi og núverandi prestum í Norðurstreymoy. Veitslan verður í bygdahúsinum í Hósvík allan seinnapartin. Eisini har fer Magni Christiansen at syngja nakrar sangir.

Klokkan 18.00, verður kvøldgudstænasta við altargongd, við luttøku av Bjarna Bæk, dómpróvsti og prestunum í Norðurstreymoy, Marjun bæk, Ingu Poulsen og Mogens Tilsted Christensen. Á hesari gudstænastuni syngur Sunnudagskórið.

Dagurin endar við kaffi í Missiónshúsinum í Hvalvík, har øll eru hjartaliga vælkomin.

Hvalvíkar kirkja er elsta kirkja í Føroyum, og er bygd úr træi.



## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymsan hátt hjálptu okkum og sýndu okkum samkenslu, tá elskaði maður og pápi okkara

**Niels Petersen**
**Nuuk, búsitandi í Kaldbak**

andaðist og varð jarðaður.

Tøkk fyri blómur, kransar, gávur og heilsanir.
Tøkk til prest, kirkjutænarar, sangarar og øll tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað, og tøkk til øll tykkum, sum á ymsan hátt hjálptu til við ervinum.

Ein serlig tøkk til starvsfólkið á G4 fyri dyggan stuðul og umsorgan hansara seinastu tíð.

**Sólja, Ivalu og Janus**